## Lova grikkum hjálp

Grikska stjórnin fekk í gjár vissu fyri, at landið fer ikki á húsagang. Aftan á ein ríkis- og stjórnarleiðarafund í ES í gjár segði ES-forsetin, Herman Van Rompuy, at evrulondini hava veitt vissu fyri, at tey eru til reiðar at lata grikkum ta neyðúgu hjálpina, so landið ikki fer av knóranum. Grikkaland skal rinda meiri enn 70 milliardir krónur í avdrøgum í ár. So nógvar pengar hevur landið ikki, og tað má tí fáa hjálp til at endurnýggja skuldina. Sum skilst verða tað Týskland og Frakland, sum skulu veita trygd fyri teimum nýggju lánunum.



## Keypa ikki SAS

Nú skandinaviska flogfelagið SAS enn eina ferð hevur kunngjørt eitt vánaligt roknskaparúrslit, hevur tað ljóðað, at onkur útlendsk feløg hava áhuga í at keypa SAS. Millum tey nevndu feløgini er tað týska Lufthansa, men ein talsmaður fyri felagið sigur, at Lufthansa ætlar sær ikki at keypa SAS. Aage Dünhaupt, sum er samskiftisstjóri hjá Lufthansa, sigur við Berlingske Business, at felagið hevur úr at gera við at samansjóða móðurfelagið og dótturfeløgini Austrian Airlines, Brussels Airlines og BMI. Men felagið hevur ongar ætlanir um at fáa SAS sum dótturfelag, sigur hann.

# Nú sleppur báturin í neystið

**Í hesum døgum er Johan Leo úr Fámjin í ferð við at umbyggja bát sín, »Borgin« á havnalagnum í Skopun. - Nú fari eg at kunna fáa bátin inn í neystið har suðuri, greiðir hann frá**



*- Nú gleði eg meg at sleppa til útóðrar við "Borgini", sigur Johan Leo úr Fámjin*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

ÚTRÓÐUR
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Skopun:** - Jú, hetta er ein góður bátur!

Tað var tíðliga í vetur, at Johan Leo keypti henda stóra seksæringin frá einum manni av Argjum.

Honum var greitt, at hesin báturin fór ikki beinanvegin at kunna sleppa inn í neystið í heimbygdini.

- Orsøkin til hetta er, at Borgin var frambygdur. Nú hava vit flutt stýrihúsið afturum, so nú verður betri, sigur hann.

Júst hetta er ein avgerandi fortreyt fyri, at Johan og aðrir útróðrarmenn í Fámjin kunnu útinna vinnugrein sína.

Teir hava eitt havnalag í bygdini, har bátarnir saktans kunnu liggja. Men umstøðurnar eru soleiðis, at, at bátarnir mugu setast inn í eitt neyst, tá veðurlíkindini noyða teir til tað.

Í Fámjin, á vestursíðuni á Suðuroynni, kann vera brimhart, og tí eigur hvør bátur sítt neyst og sín vogn.

- Ja, sjálvt ein slíkan góðveðursdag sum í gjár *(mánadagin í hesi vikuni, blðm.)*, var nógv brim í Fámjin, vísir Johan á.

Áðrenn "Borgin" kemur so langt sum í sítt egna neyst, skal hann umbyggjast og umvælast eitt sindur.

Til hetta arbeiðið fær Johan Leo góða hjálp frá svági sínum, Hans Kristian Olsen, ið virkar sum havnafúti í Skopun.

- Helst skuldu vit kunna flotað bátin seinast í mars mánaði, greiðir Johan Leo spentur frá.

# Krevur nógv at búgva á Sandoynni

**- Vit á Sandoynni mugu bara til at síggja í eyguni, at tað krevur meiri av okkum sum vilja búleikast her, enn tað nakrantíð hevur gjørt, sigur borgarstjórin á Sandi, Brandur Sandoy**

FERÐASAMBAND
*Snorri Brend*
*smorri@sosialurin.fo*

**Sandoy:** Nú eru liðin umleið 10 ár, síðani tosið byrjaði um ein undirsjóvartunnil til Sandoynna.

Sambært Brandi Sandoy er tíðin nú komin, at fólkið í oynni setur sær sjálvum spurningin um, hvussu nógv nærri tey eru komin eini loysn á hesum máli.

- Svarið má vera, at vit als ikki hava flutt okkum úr stað, sigur borgarstjórin m.a. í eini viðmerking á Sandoyarportalinum.

Hann vísir á, at nógv varð tosað, og nógv varð lovað fyri 10 árum síðani. Men hvat er veruliga hent? Onki!

Enn verður nógv tosað, men tosið er, fyri tey sum búgva á Sandoynni, meiri vent til frustrasjónir, av tí at man ikki sær nakað úrslit.

- Fyri tey, sum ikki búgva á Sandoynni, er Sandoyggin og tað afturvendandi tosið um tunnil, vorðið til ein pestilens, til grát og tannagrísl um henda vælsignaða Sandoyartunnilin, sum vit jú ikki hava ráð til, og um henda veruleikan, sum hesi ólukku fólkini á Sandoynni ikki duga at síggja í eyguni.

- Við at búgva á Sandoynni, má tú ásanna, at tú hevur ikki, og fyribils kemur tú heldur ikki at hava somu møguleikar sum onnur nærri miðøkinum hava, vísir Brandur Sandoy á.

- Hetta er ein veruleiki, og vit mugu bara liva við honum, so leingi sum vit ikki hava politikkarar, sum hava hegni og dugnaskap at vinna okkum sømdir landspolitiskt. Jú fyrr vit innsíggja henda veruleika, jú fyrr kunnu vit taka støðu, um vit veruliga vilja offra tað sum krevst, fyri at búgva á Sandoynni, sigur hann m.a. í viðmerking sínari.

**Vit venda aftur til hetta málið í einum komandi blaði!**



*- Tað, at vilja offra nakað, og at geva avkall uppá møguleikar, sum aðrir borgarar í landinum hava, er í dag ein veruleiki fyri okkum, sum búgva á Sandoynni, sigur borgarstjórin á Sandi, Brandur Sandoy*
*Mynd: Jens Kristian Vang*